# FERÐAVINNUÆTLAN
# FYRI NÓLSOY



TÓRSHAVNAR KOMMUNA
OG VISIT TÓRSHAVN
DESEMBER 2020

Útgevari: Tórshavnar kommuna og Visit Tórshavn
Útgivið: Desember 2020
Myndir: Ólavur Frederiksen (Faroephoto.com)
Málslig ráðgeving: Randi Kúrberg
Uppseting og snið: Henning Hjalt Nicodemussen (NiNG)
Talgild útgáva kann takast niður á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu

# INNIHALDSYVIRLIT

SAMANDRÁTTUR ..... 4
INNGANGUR ..... 6
STØÐULÝSING ..... 8
DAGSINS FERÐAFÓLK ..... 10
ÁTØK, KOSTNAÐUR OG TÍÐARÆTLAN ..... 12
KUNNING, MIÐLING OG BRANDING ..... 14
GONGD Í HAGA OG NÁTTÚRUVERND ..... 20
KUNNINGARSTOVAN, UNDIRSTØÐUKERVI OG HENTLEIKAR ..... 24
SØVN, FORNMINNI OG MENTANARARVUR ..... 29

# SAMANDRÁTTUR

Hendan menningarætlan fyri ferðavinnuna í Nólsoy er ein roynd at skipa eina ferðavinnu, sum er skynsom, ábyrgdarfull og burðardygg innan hesi kjarnuøki:

- Náttúru og umhvørvi - at ferðavinnan hevur fyrilit fyri lógum og náttúrúvernd í økinum.
- Fornminni – varðveitsla, miðling og menning.
- Búskap - at ferðavinnan kann vera ein møguleiki hjá íbúgvum at fáa úrtøku úr síni vinnu við at menna tilboð og upplivingar í sínum øki. At ferðafólk leggja nakað fíggjarligt virði eftir seg á staðnum. Góðska heldur enn hópferðavinna.
- Sosial burðardygd - at íbúgvarnir eisini fáa eina jaliga uppliving av ferðavinnuni, at hon ikki leggur seg inn á dagliga lívið og sosialar skipanir á staðnum.

Menningarætlanin hyggur ígjøgnum hesi parametur og mælir til 23 átøk:

## KUNNING, MIÐLING OG BRANDING

– at oyggin, støð og virðir verða væl lýst, og at tær góðu søgurnar verða sagdar. At marknaðarføringin er skynsom og uppfinnsom, og at hon talar til allar málbólkar.

## GONGD Í HAGA OG NÁTTÚRUVERND

– at gongd í haga hevur fyrilit fyri Nólsoy sum Ramsar-øki, bæði á landi og á sjógvi, og at samstarv er millum hagapartar og vinnuligt virksemi í ferðavinnuni. At ábøtur verða gjørdar á almennar gøtur og varðar.

## KUNNINGARSTOVAN OG HENTLEIKAR TIL FERÐAFÓLK

– at Kunningarstovan í Nólsoy virkar sum savnandi miðdepil fyri alla ferðavinnuna, og at hon hevur eitt sterkt undirlendi í vinnuni og millum fólkið á staðnum. At neyðugir hentleikar eru til ferðafólkini, og at tey vita, hvar tey skulu fara. At atkoma er hjá øllum. At vitan og hagtøl um ferðafólkini verða savnað.

## SØVN OG FORNMINNI

– at ferðavinnan ikki slítur upp á fornminnini á staðnum, men heldur stuðlar uppundir, undirbyggir søguna og er við til at menna miðlingina av fornminnum í tøttum samstarvi við avvarðandi myndugleikar og feløg.

## TILGONGDIN TIL FERÐAVINNUÆTLANINA

Hendan menningarætlan fyri ferðavinnuna í Nólsoy hevur til endamáls at lýsa og gera tilmæli, sum avvarðandi partar og ábyrgdarar av ferðavinnuni kunnu arbeiða fram ímóti í ymsum fláum og við ymsum tíðarfreistum. Til gagns fyri vinnu, íbúgvar, land og kommunu. Fleiri av tilmælunum krevja størri útgreining av ávísum fakøki og eisini størri fíggjarjáttanir. Aðrar krevja umfatandi politiskar lógarásetingar, raðfestingar og ábyrgdarbýti.

Ætlanin fevnir um tilmæli og átøk, sum eru grundað á støðulýsingar, samrøður og samskifti við íbúgvar, myndugleikar, ferðasmiðir, festarar, veitarar og onnur, ið varða av ella hava áhuga fyri ferðavinnuni í Nólsoy. Ein ferðavinnuverkstova varð hildin í Nólsoy í mai 2020 fyri aktørar í ferðavinnuni. Spurnakanning varð løgd út á Facebook-bólk fyri íbúgvar í Nólsoy várið 2020. Túrur hevur verið út á Borðuna eftir varðagøtuni og við ferðaleiðara í Húsini við Brunn (bygdarsavnið).

Menningarætlanin leggur seg eftir teimum tilráðingum, sum eru nevndar í ferðavinnupolitikkinum fyri Tórshavnar Kommunu frá 2017, í heildarætlanini hjá Uttanríkis- og Vinnumálaráðnum frá 2017 og í menningarætlanini hjá Visit Faroe Islands frá 2019.



> *"Nólsoy – har markið hvørvur millum bygdarfrell og hipstarar"*
>
> *Maud Wang Hansen*

# INNGANGUR

Søgan um ferðavinnuna í Nólsoy er sum heild ein sera jalig søga um eina bygd, sum tók ábyrgd av økta ferðafólkastreyminum, og sum megnaði at lofta og menna ferðavinnuni á staðnum. Ikki einans við eini Kunningarstovu, men eisini við fleiri evnaríkum íverksetarum, sum sóu og síggja møguleikarnar í ferðavinnuni. Tó er ferðavinnan í Nólsoy eisini viðbrekin, ikki einans fyri náttúru og djóralív, men eisini fyri tey, sum reka virksemi innan ferðavinnu og heilt ella partvíst liva av henni. Sveiggj eru í heilum, broyttar umstøður koma javnan fyri, soleiðis at ferðavinnan á oynni alla tíðina má umstilla seg og tillaga seg nýggjar umstøður. Stundum er mótstríð um ynski hjá landinum um økta ferðavinnu og so veruleikan úti á oyggj, eitt nú við óregluligum ferðasambandi. Hetta eru viðurskifti, sum eru sera týdningarmikil at taka støðu til. Nú, ið ferðavinnan alsamt økist, er neyðugt at vera fyrivarin til tess at skipa eina burðardygga ferðavinnu og at framtíðartryggja ferðavinnuna. Soleiðis at bæði vinna, fólk á staðnum og gestirnir kenna hana sum jaliga.

Føroyar eru á heimskortinum og blanda seg við hini londini um ferðatilboðini. Økta ferðafólkatalið og økti eftirspurningurin hava havt við sær, at fleiri føroyingar síggja møguleikar í ferðavinnuni. Fleiri tænastur og upplivingar draga ferðafólkini higar, umframt høvuðsattraktiónin: Tann reina og óspilta náttúran. Ferðavinnan upptekur okkum føroyingar, og vit tosa nógv um hana. Summi øki eru undir stórum trýsti av ferðavinnuni, meðan onnur merkja minni. Hvussu kunnu vit reka skynsama ferðavinnu og samstundis verja náttúru og umhvørvi? Hvussu nógv trýst kann náttúran taka? Hvør hevur rættin til hagan? Hvussu menna vit upplivingartilboð, sum kasta nakað av sær? Hvørji ferðafólk ynskja vit til okkara? Og hvørji ynskja vit ikki? Spurningarnir eru nógvir, tó at málini eru greið: Vit vilja hava góðsku heldur enn hópferðavinnu. Ferðavinnan skal geva inntøkur og vera eitt bein aftrat í okkara annars viðbreknu høvuðsvinnu. Ferðavinnan skal vera ábyrgdarfull og burðardygg.

Endamálið við hesi ferðavinnuætlan er at koma við uppskoti um eina burðardygga ferðavinnu, sum eitt nú hyggur eftir tilmælum úr ferðavinnupolitikkinum hjá Tórshavnar Kommunu frá 2017 og menningarætlanini hjá Visit Faroe Islands frá 2019, og eisini teimum virðum, sum oyggin sjálv ynskir at raðfesta, soleiðis at fólkið á staðnum kennir seg aftur í ferðavinnuni nú og frameftir.



*“Nólsoyggin er ikki ein útjaðari, men ein forstaður til Havnina. Tá fólk kemur við skipi til Havnar, og tey síggja Nólsoynna, er tað fyrsta, tey skulu hugsa: Tað er HAR út, vit skulu!”*

*Terji Rasmussen, íbúgvi*

STØÐULÝSING:

# FERÐAVINNAN Í NÓLSOY

Originalitetur, gestablídni, tollyndi, kreativitetur eru jalig spjaldur, sum mangan verða fest á oynna og bygdarfólkið, og sum gesturin skjótt ber eyga við. Hetta er kanska ikki so løgið, tá staðið hevur fostrað navnframar persónligheitir so sum Nólsoyar Páll og Ova Joensen.

Nógvir kreativir íverksetar búgva í Nólsoy, og tað tykist, sum leiðin frá hugskoti til handling er stutt. Fólk í oynni duga væl at menna síni hugskot, soleiðis at fleiri teirra standa týðuliga fram í landslagnum her heima og eru eisini kend langt út um landoddarnar. Nevnast kunnu Maggies Café, "Besta konsertstað í landinum" sambært tónleikarum, og matstovan Gimburlombini, sum vann norðurlendsku Embluvirðislønina "Best Nordic Food Destination 2019". Jens-Kjeld Jensen, fuglafrøðingur, hevur um nakar sett Nólsoynna á heimskortið við síni gransking, túrum og greinum í altjóða tíðarritum. Kaffistovan, sum hevur verið til í fleiri áratíggju, hevur fyri mong verið fasta vitjanarstaðið hjá gestum. Hesi trý áðurnevndu matstøð lótu øll aftur í 2019-20. Bygdin er somikið lítil, at tá ein matstova letur aftur, merkir hetta stórar broytingar. Tá allar matstovur lata aftur at kalla í senn, gevur hetta eitt stórt tómrúm, ikki einans í bygdarlívinum og fyri trivnaðin, men eisini fyri ferðavinnuna. Hetta vísir, at ferðavinnuvirksemið kann vera líka so viðbrekið sum trýstið á náttúruna.

## FARLEIÐIN

Tað er lutfalsliga lætt at koma til og úr Nólsoy. Sjóvegis farleiðina røkir bilferjan Ternan hjá Strandfersluni við fleiri túrum dagliga.Er óreglusemi í farleiðini, merkir ferðavinnan (og íbúgvarnir) á staðnum hetta beinanvegin.

## KUNNINGARSTOVAN

Í 2007 lótu eldsálir í Nólsoy saman við Tórshavnar Kommunu eina Kunningarstovu upp mitt í bygdini, sum øll árini hevur havt opið hvønn dag í summarhálvuni frá 1. mai til 1. septembur. Umframt samskifti við ferðavinnuaktørar hinar mánaðirnar á árinum. Gjøgnum árini hava skiftandi leiðarar myndað Kunningarstovuna, samskipað vitjanir, ment upplivingar, tænastur og savnað ella bjóðað uppgávur í ferðavinnuni út í Nólsoy. Nógv broyttist á ferðavinnuøkinum í Nólsoy á vetri 2019-2020. Eitt nú varð leigumálið uppsagt, har Kunningarstovan hevði verið øll árini, umframt at uppgávan at røkja Kunningarstovuna varð bjóðað út av nýggjum. Ein ávís óvissa var í bygdini hendan veturin, um hvat skuldi henda á ferðavinnuøkinum. Ein óvissa, sum hinvegin eisini staðfesti eitt ynski og ein vilja í bygdini til at hava eina savnandi Kunningarstovu sum miðdepil fyri ferðavinnuna á oynni.

## MATVEITARAR

Nettupp tað, at matveitingarstøð hava verið í bygdini, hevur gjørt sítt til, at talið av ferðandi er økt. Harumframt hava einstaklingar hjávinnu av at matgera til bólkar, sum koma út dagsferðir. Eisini veitarar undir skipanini Heimablídni hava havt økta inntøku. Matvøruhandil er í bygdini og er opin alt árið. Eftirspurningur eftir matstøðum er sjálvsagt enn til staðar, kanska enntá øktur, tí lendið longu er taðað til hendan marknaðin. Okkurt matstað er latið upp aftur (Lamaland), umframt at heimablídni við Maud Wang Hansen hevur fingið vind í seglini, sama við felagsátakinum Kokk & Klauvn, sum bjóða heildartænastu við mati, heitum potti, baðstovu og tíðum eisini undirhaldi.

## FERÐALEIÐARAVIRKSEMI

er góð hjávinna hjá fleiri einstaklingum í Nólsoy. Eitt kervi av uml. 10-15 staðbundnum ferðaleiðaraum eru í Nólsoy, sum skræddaraseyma túrin í samráð við Kunningarstovuna og ferðafólkini. Haraftrat eru ferðaleiðarar, sum koma uttaneftir við bólkum.

## BÁTATÚRAR

Fleiri fyritøkur bjóða bátatúrar rundan um oynna, har ferðafólk hava møguleika at uppliva oynna sjóvegis. Hesi eru eitt nú Norðlýsi, NAX, RIB62 og onnur. Stundum verður farið í land á Stallinum á Borðuni, á Hósmøl, umframt í bygdini.

## SEINGJARPLÁSS

Kaffistovan, sum í nógv ár bæði var matstova og hevði Ból&Bita, læt aftur í 2020. Tískil gjørdist talið av seingjarplássum í Nólsoy brádliga munandi minni. Einstøk summarhús eru til tó til leigu, sum Kunningarstovan umsitur. Royndarhúsið hevur 30 madrassur, og Missiónshúsið kann eisini hýsa gistandi bólkum.

## HEIMAVIRKIÐ

er eitt samyrki millum fólk í Nólsoy, sum selja handgjørdar vørur, bæði siðbundið føroyskt heimavirki og nýtt snið. Heimavirkið hevur sølu í Avhaldshúsinum frá miðskeiðis í mai og til septembur. Virksemið er rikið so at siga sjálvboðið. Inntøkan fyri vørurnar fer til tann, sum hevur gjørt hana.

## NÓLSOY SUM RAMSAR-ØKI

Nólsoy varð í 2012 útnevnd at vera føroyskt Ramsarøki. Hetta merkir, at oyggin er serliga áhugaverd í sambandi við fugla og náttúruvernd, gransking og samstundis eru nøkur øki eisini serliga viðbrekin. Ramsarnevndin fyri Nólsoy hevur regluligar fundir við árligum eftirmetingum og frágreiðingum við átøkum.

## ROYNDARHÚSIÐ

er eitt savnandi bygdarhús hjá ungmannafelagnum Royndini. Húsið verður nógv útleigað til bólkar alt summarið. Felagið handan Royndarhúsið hevur í fleiri ár arbeitt við at fáa byggiloyvi og at skaffa fígging til at breiðka bygningin og byggja út eystanfyri og hevur í juni 2020 fingið byggiloyvi frá kommununi til hesa byggiætlan. Tá útbyggingin verður liðug, verða uppaftur størri møguleikar hjá ungmannafelagnum og ferðavinnuni annars at skipa fyri mentanartiltøkum, hýsa ráðstevnum, fundum, skeiðvirksemi og øðrum inntøkuskapandi virksemi.

## AVHALDSHÚSIÐ

er hús miðskeiðis í bygdini, sum summarhálvuna hýsir Heimavirkisfelagnum í Nólsoy í kjallaranum. Uppiá er pláss fyri uml. 30-40 fólkum at eta, og er køkur eisini tøkur. Eisini Avhaldshúsið verður regluliga leigað út, serliga summarhálvuna til familjuútferðir, arbeiðspláss, skúlar og barnagarðar. Húsið liggur væl fyri mitt í bygdini við síðuna av Matvøruhandlinum, fótbóltsvøllinum og við sandin á Malarenda. Fleiri møguleikar eru við húsinum, um tað verður dagført, eitt nú við at uppdatera loftið, so at soviþláss eru møgulig fyri bólkar, umframt at dagføra vesi og møguliga gera brúsurúm í kjallaranum.

*"Ferðavinnan er ein fjølbroytt, avbjóðandi og stuttlig vinna, sum fyri meg/okkum eisini er vorðin ein lívsstílur"*

*Barbara Andreasen, Lamaland*

# DAGSINS FERÐAFÓLK

Nólsoy er upp á nógvar mátar eitt áhugavert og øðrvísi ferðamál. Málbólkurin, sum vitjar oynna er ein sera samansettur bólkur við fjølbroyttum ynskjum og væntanum. Her er okkurt bæði fyri náttúru- og fuglaáhugaða gestin, fyri gongufólkið, fyri tann søguáhugaða, fyri listafólkið og fyri býarfólkið, sum kemur ein túr út at njóta eina máltíð og eitt mentanartilboð.

Eygleiðingar vísa, at serliga føroysk ferðafólk vitja Nólsoy í mai og juni, tá nógv arbeiðspláss gera árligar starvsfólkaútferðir. Hesi vitja ofta ein heilan dag og fáa eina heildarupplivíng, til dømis gongutúr í hagan, sigling við skjóttgangandi báti, mat, konsertir og túr við ferðaleiðara gjøgnum bygdina, har vitjað verður áhugaverd støð. Sama tíðarskeið vitjar stórur skari av barnagørðum og skúlum, sum steðga úr einum upp til fleiri dagar, t.d. við setursskúla. Serligar dagar á sumrinum, so sum Oyggjadagin og á Ovastevnu eru tað nógv flest føroyingar, sum vitja – og talið av ferðafólki er munandi størri hesar dagar. Juli og august eru tað meira tey útlendsku ferðafólkini, sum vitja. Ferðafólk vitja eisini uttan fyri háárstíðina. Ynski hevur verið frammi um, at Kunningarstovan heilt ella partvíst hevur opið alt árið.

Ymisk rák eru í ferðavinnuni kring okkum, sum rigga væl í Nólsoy. Eitt nú Localhood – at tann vitjandi ynskir at koma tætt upp at íbúgvunum og gerast partur av bygdarlívinum í eina tíð. Annað er Voluntourism, eitt rák, sum kundi gjørt ein vørr í Nólsoy, um farið verður rætt fram. Nissjuferðavinna er eisini ein máti at fáa júst málbólkin, ein ynskir sær, við at leggja dent á dygdina heldur enn nøgdina.

Gallup gjørdi eina kanning í Føroyum summarið 2018 við ferðandi, sum komu til Føroyar loftvegis og sjóvegis. 483 ferðafólk luttóku. Sambært hesi kanning var høvuðsorsøkin til at vitja Føroyar náttúran (66,5%), og 54,4 % søgdu, at besta upplivingin var gongutúrar. Tó eru ongar kanningar gjørdar av, akkurát hvør gesturin er, sum vitjar Nólsoy, og hví hann velur júst Nólsoy sum ferðamál, og er hetta nakað, sum eigur at verða ment í framtíðini: brúkarakanningar av ferðafólkunum.

## HUGBURÐUR TIL FERÐAVINNUNA Í NÓLSOY

Í spurnakanning millum fastbúgvandi í Nólsoy á várið 2020 varð m.a. spurt nærri til teirra hugburð um ferðafólkini. Av teimum 56 fólkunum, sum svaraðu, svaraðu 55,4%, at tey mettu, at talið av teimum ferðandi var akkurát passaligt, sum tað er nú (2019), meðan 16,1% svaraðu, at talið var alt ov lítið, og at Nólsoy kann taka ímóti upp aftur meir ferðafólki. 14,3% svaraðu ávikavist, at tey hildu, at alt ov nógv ferðafólk gingu runt í bygd og haga - ella at tey ikki vistu. Eftir viðmerkingunum í somu kanning at døma, tykist hugburðurin millum tey fastbúgvandi um ferðavinnuna sum heild at vera jaligur, men at tey eisini kenna ábyrgd og ynskja ábøtur á fleiri viðurskifti. Tiltikna gestablídnið og tollyndið eru eginleikar, sum ikki eiga at verða tiknir fyri givið ella misnýttir, men eru eginleikar, sum júst sum umhvørvið, kunnu vera viðbreknir og skulu á sín hátt eisini røkjast við skynsemi og virðing. Framhaldandi er neyðugt at hava eitt opið og gjøgnumskygt samskifti við íbúgvarnar og javnan gera kanningar um, hvat tey halda um ferðafólkini á oynni og ferðavinnuna sum heild.



# ÁTØK, KOSTNAÐUR OG TÍÐARÆTLAN

| KUNNING, MIÐLING OG BRANDING | Ábyrgd | 2021 | 2022-24 |
|---|---|---|---|
| Arbeiðið við at dagføra kunningarskelti og onnur skelti í Nólsoy heldur fram. Hesi skelti skulu skipast og góðkennast av avvarðandi myndugleika | VN/TK/VF | 20.000 | |
| Prentkort av bygdini og allari oynni, sum fæst ókeypis á Kunningarstovuni | VN | | 50.000 |
| (a) Dagaføra visitnolsoy.fo og kanna møguleika fyri at brúka heimasíðusnið sum aðrar kunningarstovur brúka | VN | 30.000 | 30.000 |
| (b) umframt at seta miðvísa myndatøkuverkætlan í gongd, so at visitnolsoy.fo fær sín egna serstaka samleika | | | |
| Peningur eigur at verða settur av til at Visit Nólsoy er virkin á sosialum miðlum. | VN | | 15.000 |
| Kunningarstovan savnar og betrar um miðlingina av teim góðu søgunum | VN | | 10.000 |
| Innanhýsis ferðavinnudagur fyri íbúgvar/veitarar í Nólsoy. | VN | | 10.000 |
| (a) Fólk í Nólsoy luttaka á skeiðum hjá Hugskotinum og (b) Kunningarstovan fer í samstarv við Hugskotið um at menna og skipa fyri førleikamennandi skeiðum við serligum atliti til ferðavinnuna í Nólsoy. | VN/Hugskotið | 15.000 | |
| Hugskotskapping í bygdini um besta brand fyri Nólsoynna. | VN | | 5.000 |

| GONGD Í HAGA OG NÁTTURUVERND | | | |
|---|---|---|---|
| Ábøtur eru neyðugar í brattanum niðan á oynna, umframt at varðar á leiðini verða viðlíkahildnir. | TK/VN | | 50.000 |
| Steyrar frá Closed for Maintanance skulu festast av nýggjum. | | | |
| Støðug eftirmeting av ferðaloyvunum og uppfylging av lógaruppskotinum um gongd í haga. | VN/Festari | VJ | |
| Kunningarstovan samstarvar við hagarpartin og veitararnar, sum seta ferðafólk av á Stallinum, um at tryggir karmar eru um farleiðina, við lendingina og gøtuna niðan til almennu bygdagøtuna. | VN/Festari | VJ | |
| At avmarka marknaðarføringina Suður í Dalar og at vitjað verður bert saman við ferðaleiðara og í sambandi við ringmerkingar hjá góðkendum ferðaleiðara. | VN | VJ | |
| Skelti eigur at verða sett upp Suðuri í Dølum, sum kunnar um hetta serstaka økið, og um at ferðafólk ikki eiga at fara einsamøll víðari suður í Urðina, og kikari eigur at verða settur upp, so ferðafólk kunnu njóta útsýnið haðani. | VN/TK | | 75.000 |

| KUNNINGARSTOVAN, UNDIRSTØÐUKERVI OG HENTLEIKAR | | | |
|---|---|---|---|
| Endurskoða bygnaðin av Kunningarstovuni: Kunningarleiðarin tekur stig til ein netverks-/arbeiðsbólk, sum virkar sum sparringspartur, sjálvboðin hjálp, vitanardeiling og framtíðartrygging av stovninum. | VN | VJ | |
| Samstarvið millum Visit Nólsoy og Visit Tórshavn eigur at styrkjast á fleiri økjum. | VN/VT | VJ | |
| SSL og Kunningarstovan samskifta neyvt um at fáa kunning um broytingar í ferðaætlanini út til ferðafólkini. | VN/SSL | VJ | |
| (a) SSL eigur at hava fyrilit fyri samlaða tørvinum á ferðaflutninginum, harvið eisini fyri ferðavinnuni og (b) betra um kunning viðv. broytingum í ferðaætlan og (b) gera árligt eftirlit og ábøtur av ferjuni í lágárstíð. | SSL | VJ | |
| Royndarætlanin við húsvognum fyri 2020 verður eftirmett. Síðani verður ein heildarætlan fyri húsvognaferðavinnuna fyriskipað. | VN/TK | VJ | |
| Við tjaldingarstaðið er bráneyðugt at skelti koma upp um trygdina | VN/TK | 5.000 | |
| Ein ætlan fyri almennar hentleikar so sum brúsu, vesi, vask og rusk skal gerast. | VN/TK | VJ | |
| Heildarætlan fyri koyristólabrúkarar eigur at verða gjørd | VN/TK | VJ | |

| SØVN, FORNMINNI OG MENTANARARVUR | | | |
|---|---|---|---|
| Skelti um prinsessutoftinar í samstarvi við Tjóðsavnið. Viðlíkahald, røkt. | VN/TK/Tjóðsavnið | | 20.000 |
| Á heimasíðuni hjá visitnolsoy.fo og tjodsavnid.fo verður í teksti, myndum, tekningum sagt um søguna um fornminnini og søvn í Nólsoy. Møguliga skulu QR-kodur á skeltum verið knýttar at heimasíðunum. | VN/Tjóðsavnið | VJ | |

**STYTTINGAR: VFI = Visit Faroe Islands, TK = Tórshavnar Kommuna, VT = Visit Tórshavn, US = Umhvørvisstovan, VN = Visit Nólsoy/Kunningarstovan í Nólsoy, VJ = Verandi játtan**

# KUNNING, MIÐLING OG BRANDING

## SKELTING

Sera týdningarmikið er, at greið kunning er um ferðamálið og á ferðamálinum. Bæði talgilt á netinum og við skeltum. At streymurin av ferðafólki fer har, sum ynskt verður, tá tey koma í land við Ternuni.

Visit Faroe Islands (VFI) fór í 2019 undir nýggja heildarætlan við skelting fyri alt landið við gjøgnumgangandi felagssniði. VFI ráðgevur og samskipar hesa skeltaverkætlan. Ein felags skeltingarleistur gevur greiða og einsháttaða kunning, sum tann ferðandi lættliga kennir aftur. Støða skal takast til skeltingina í síni heild, so at skeltini tæna sínum endamáli, sum er at veita kunning/leiðbeining, og samstundis fella væl inn í landslagið. Eisini er VFI í ferð við at seta kunningarskíggjar upp á ymsum støðum kring landið, har ferðafólk finna henta og dagførda kunning á staðnum. Í eini bygd sum í Nólsoy kundi verið áhugavert at leitt ferðafólkini ávísar leiðir og at sýna ávísan atburð við at nýta nudging, kanska við ljóði, stuttligum ávísingum, øðrvísi sniðgeving av valmøguleikum – t.d. til at fáa fólk at lata vera við at taka krabbar úr fjøruni, ikki at svimja nakin í sjónum, fastbúgvandi fyrst umborð á Ternuna, tá trýst er á farleiðini o.s.fr.

**ÁTAK: Arbeiðið við at dagføra kunningarskelti og onnur skelti í Nólsoy heldur fram. Hesi skelti skulu skipast og góðkennast av avvarðandi myndugleika.**

## NUDGING

(eisini kallað choice architecture) er ein háttur at leiðbeina fólki, uttan at skelti er neyðugt. Ístaðin fyri at seta forboð og siga fólki, hvat tey ikki skulu gera, skulu tey heldur hjálpast til at hava rættan atburð og rætt fyrilit. Eitt slag av umvendari sálarfrøði. Nudging kann vera hent at nýta aftrat teimum skeltum, sum eru alneyðug at seta upp.




*"Vit eru eisini nokk so bevíst um at vera snedig. Tað er eisini tí, at listafólk tíma at flyta út her, tí tey sleppa at vera, sum tey eru. Tað er okkurt við, at her er meira friður enn í Havn"*

*Kokk & Klauvn*



## KORT YVIR HENTLEIKAR OG ÁHUGAVERD STØÐ

Nógv ferðafólk spyrja eftir korti yvir Nólsoynna. Hóast nógv finna sær kunning á talgildum miðlum, er eisini hent at fáa eitt prentað kort í hondina. Eitt pappírskort við kunning og myndum av serligum støðum umframt eitt kort á baksíðuni yvir alla oynna við týðuligari uppmerking av bygdagøtuni út á Borðuna og norð á Boðan í einum lættlisnum grafikki. VFI og Umhvørvisstovan eru í gongd við verkætlanum við at menna hagakort yvir allar almennar bygdagøtur í Føroyum, bæði prentað og talgilt.

**ÁTAK: Prentkort av bygdini og allari oynni, sum fæst ókeypis á Kunningarstovuni**

## HEIMASÍÐA OG LEITIPORTALAR

Dagsins ferðafólk finna sær í høvuðsheitum vitan um ferðamálið sjálv, langt áðrenn ferðin byrjar. Gjøgnum talgildar miðlar, heimasíður og leitiportalar. Fartelefonin er fastur fylgisveinur hjá teimum flestu og høvuðsamboðið, tá ið tey finna sær kunning á ferðini. Tí er hent at hava eina heimasíðu, sum er dagførd og frammarlaga í SEO1-leitingum. Heimasíðusniðið hjá VFI, sum nógvar kunningarstovur í landinum nýta, hevur onkrar fyrimunir fram um egið snið: SEO er optimerað á hesum síðum, og googleleitan beinir lættliga relevant nólsoyarevni upp. Haraftrat er trygdin í lagi, og hon er brúkaravinarlig, eitt nú til at menna bókingarskipanir ella aðrar funksjónir, um Visit Nólsoy ynskir tað.

Umráðandi er, at almenn støð hava ókeypis wifi, og at ferðafólk lættliga fáa keypt data á telefonina.

**ÁTAK: (a) Dagføra heimasíðuna hjá visitnolsoy. fo og kanna møguleikan fyri at brúka heimasíðusniðið, sum aðrar kunningarstovur brúka, (b) umframt at seta miðvísa myndatøkuverkætlan í gongd, so at visitnolsoy. fo fær sín egna serstaka samleika.**

## MIÐLING

Sosialir miðlar eru eisini ein kend og skjót leið at røkka ymiskum málbólkum. Umframt at Kunningarstovan er virkin á hesum pallum, kunnu veitarar í ferðavinnuni í Nólsoy finna sínar málbólkar á ymsum sosialum miðlum. Umráðandi er eisini, at Kunningarstovan og tey, sum skipa fyri almennum tiltøkum í Nólsoy, sjálv eru virkin á whatson.fo – ein kalendari, sum savnar yvirlit yvir tiltøk og upplivingar um alt landið.

**ÁTAK: Peningur verður settur av til, at Visit Nólsoy er virkin á sosialum miðlum.**

## AT SKAPA FORVITNI OG MIÐLA TÆR GÓÐU SØGURNAR

Menningarmøguleikar eru í øllum. Tað, sum umrætt er, er í fyrstu atløgu at vísa á tær góðu søgurnar við at siga: "Hetta er áhugavert!" Við at geva teimum eitt heiti, eitt snið, eina innpakking, eina forteljing, eitt virði. Miðlingin av teimum góðu søgunum er alneyðug. Í fyrstu atløgu so at vørur, upplivingar, tænastur spyrjast burtur úr, og síðani at inntøka eisini kann spyrjast burturúr.

Nógvar eru søgurnar, og úr rúgvuni kunnu nevnast listaslóðir, eitt nú listin hjá Steffani Danielsen, Mariu Skylv Hansen, Mariu Eide og øðrum listafólki úr fortíð og nútíð. Føroysk matmentan, bóndamentan, veiðimentan. Søgur við útgangsstøði í sjónum. Tað hevði verið gott at førleikament fólk á staðnum soleiðis, at tær góðu søgurnar verða deildar, og at borgararnir harvið gerast umboðsfólk fyri heimstað sín.

## 1 SEO = "SEARCH ENGINE OPTIMIZATION"

við øðrum orðum er hetta ein háttur at gera heimasíður við relevantum leitingum sjónligari. Jú sjónligari heimasíðan er í leitiúrslitum, tess lættari er at skapa forvitni og harvið fáa vitjanir á heimasíðuna.

Mentanarvørur kunnu støðugt mennast og nýhugsast, hóast tilfeingi, keldur og tilfar er aldagamalt. Eisini her kann sjónareykan setast á ymiskar málbólkar – alt frá vøggustovubørnum til pensjónistar.

**ÁTAK: At Kunningarstovan savnar og betrar miðlingina av teim góðu søgunum**

**ÁTAK: Innanhýsis ferðavinnudagur fyri íbúgvar/veitarar í Nólsoy**

## KVEIKINGARSKEIÐ – NÝGGIR MØGULEIKAR

Sagt verður mangan, at "í Nólsoy er stutt frá hugskoti til handling, fólk fara bara beint ígongd" (eisini ein góð søga í sjálvum sær). Hetta sereyðkenni eigur at hjúklast um, og eigur møguleiki at verða veittur fyri sparring, at kveikja hugskotini og brýna vøruna, hóast summum als ikki nýtast kveikingarskeið, men 'fara bara beint ígongd'. Nógvir møguleikar eru til at reka ferðavinnu og at fáa inntøku burturúr. Til dømis kunnu túrar gerast við ferðaleiðara og menna sín serliga ferðaleiðarastíl, skipa fyri fiskitúrum, bindiverkstovum, hava B&B ella heimablídni og skipa fyri tiltøkum, har ferðafólk kunnu luttaka í gerandislívinum, fara á fjall, hoyggja, fara eftir náta...

Nógv er at hugsa um, tá farið verður undir egið vinnuvirksemi, eitt nú reglugerðir, umsóknir, skattaviðurskifti, prísáseting, marknaðarføring og annað. Hugskotið hevur ta vitanina, og kunnu fólk í Nólsoy møguliga eggjast til at melda seg til ymisk íverksetaraskeið.

**ÁTAK: (a) Fólk í Nólsoy luttaka á skeiðum hjá Hugskotinum og (b) Kunningarstovan fer í samstarv við Hugskotið um at menna og skipa fyri førleikamennandi skeiðum við serligum atliti til ferðavinnuna í Nólsoy.**

## BRANDING

Innan alt vinnuvirksemi er týdningarmikið við branding. Ferðavinnan er onki undantak. Eitt gott og sterkt brand gevur ein fyrimun í tí stóru kappingini um ferðamálini. Eitt brand er eitt eyðmerki fyri staðið. Eitt positivt spjaldur, sum er lýst úr staðnum, og sum gevur staðnum samleika og stoltleika. Eitt brand er eisini eitt lyfti til tann vitjandi um, hvat hann ella hon kann vænta sær. Til góðskuna, tænastuna og kostnaðin. Eitt brand kann eisini taka støði í teim virðum, sum staðið fegin vil vísa á, til mentanina, náttúruna, lívsstílin, siðvenjuna, tempoið, sum eyðkennir staðið. Er brandið sterkt, kann tað festa røtur og geva staðnum eitt kraftarmikið sereyðkenni. Hetta kann gerast við at tosa um eygsýnilig eyðkenni, siðvenju, at velja tey góðu virðini framum, tær jaligu søgurnar og seta hesar fram í ljósið. Fara fleiri av íbúgvunum í Nólsoy undir at reka ferðavinnu og at menna tænastur og selja vørur, so kann eitt brand nýtast sum felagsnevnari fyri allar tænastur og vørur, sum koma úr Nólsoy, og soleiðis kann hetta brandið vera við til at skapa samband millum tey vinnurekandi og geva vøruni samleika. Visit Faroe Islands hevur brandað Føroyar sum "Unexplored" "Untouched" "Unbeliveble. Nólsoyggin kann eisini kennast aftur í hesum brandi, men skal eisini verða lýst á sín egna fynduga hátt.

**ÁTAK: Hugskotskapping í bygdini um besta brand fyri Nólsoynna.**







# GONGD Í HAGA OG NÁTTURUVERND

Flestu ferðafólk, sum koma út til Nólsoyar, og sum fara suðureftir í hagan, ganga eftir almennu bygdagøtuni út á Borðuna, sum gongur ígjøgnum tríggjar hagarpartar. Varðagøtan er týðulig, líka frá farið verður út um bøgarðarnar, og til ein kemur út á Borðuna. Hesi ferðafólk eru ikki til ampa fyri drunnhvíta ella lunda ella onnur viðbrekin øki. So eru onnur vitjandi, sum ganga sínar egnu leiðir í haganum. Ávís ónøgd hevur verið gjøgnum árini um, at ferðafólk ganga í haganum uttan loyvi og summi enntá við hundi/leysum hundi.

**ÁTAK: Ábøtur eru neyðugar í brattanum niðan á oynna, umframt at varðar á leiðini verða viðlíkahildnir. Steyrar frá Closed for Maintanance skulu festast av nýggjum.**

## ROYNDARVERKÆTLAN

Í 2019 varð avtalað fingin í lag millum Kunningarstovuna og hagapartin Heimaru Helvt um sølu av ferðaloyvum til ávís støð í hagapartinum. Ferðaloyvini eru ætlað vinnuligu ferðavinnuni, og er hendan skipan við ferðaloyvum ein roynd at stýra gongu út í ávísar partar av haganum, umframt at fáa hagtøl inn og at veita vegleiðing. Inntøkan av ferðaloyvinum fer lutvíst til Kunningarstovuna og til hagapartin. Ferðaloyvini skulu støðugt mennast, soleiðis at ein ítøkilig tænasta verður seld í sambandi við ferðaloyvið, eitt nú eitt kort við týðuligari mynd av haganum. Tænastan skal mennast, kanska við QR-kodu[2], har kunning verður løgd út um serligu støðini, møguliga við GPS-koordinatum. Í løtuni er landspolitiskt kjak um gongu í haganum, nýtt lógaruppskot er nýliga lagt fram og verður viðgjørt í næstum. Neyðugt er at fylgja við í tilgongdini av møguligu broyttum umstøðum í lógarverkinum.

**ÁTAK: Støðug eftirmeting av ferðaloyvunum og uppfylging av lógaruppskotinum um gongd í haga.**

Fyritøkur, sum skipa fyri bátatúrum kring Nólsoynna, seta mangan bólkar av á Stallinum á Borðuni. Ávís ónøgd millum festararnar á Borðuni er um hetta

(2) QR = “QUICK RESPONSE
Ein tvídimensional koda, sum er merkt á eitt skelti, sum ein við fartelefonini skjótt og hent kann avlesa og fáa atgongd til eina heimasíðu ella eina app við gjøllari kunning um evnið.

*“Vit hjálpast at. Tað skal bara ein til at mótarbeiða hesi vælvildini. Mítt, mítt, mítt oyðileggur stemningin. Sjálvt í Koltri í summar spurdu tey, altso, hvussu er tað, tit gera í Nólsoy, sum riggar so væl... og svarið og holdningurin er, at vit saman taka tað í felag”*

*Kokk & Klauvn*

virksemi, partvíst tí tað ikki er ein góðkend lending, og partvíst tí økið hoyrir til hagapartin. Stórir bólkar órógva tann nógva seyðin og hagafuglin, ið heldur til har.

**ÁTAK: Kunningarstovan samstarvar við hagapartin og veitararnar, sum seta ferðafólk av á Stallinum, um at tryggir karmar eru um farleiðina, við lendingina og gøtuna niðan til almennu bygdagøtuna.**

## NÓLSOY SUM RAMSAR-ØKI

Í 2012 vórðu Nólsoy, Mykines og Skúvoy útnevndar at vera føroysk Ramsar-øki. Nólsoy er áhugaverd, eitt nú av tí at størsta drunnhvítabøli í heiminum er í Nólsoy. Ramsar-nevndin fyri Nólsoy útgav í 2016 eina serliga Ramsar-ætlan fyri Nólsoynna, sum inniheldur tilmæli um, hvat eigur at verða gjørt fyri at verja Nólsoy sum Ramsar-øki[3]. Túrar verða gjørdir Suður í Dalar við góðkendum ferðaleiðara.

Hesir túrar eru bæði almennir og partur av granskingarverkætlanum, teljing og ringmerking. Mett verður ikki, at økið, har drunnhvítin heldur til, er nóg trygt hjá ókunnugfólki at ganga sjálv. Tiltøk eru neyðug til tess at tryggja, at drunnhvítin, lundin og annar fuglur í Nólsoy kann trívast uttan hóttanir og óneyðuga órógv nú og í framtíðini.

**ÁTAK: At avmarka marknaðarføringina Suður í Dalar og at vitjað verður bert saman við ferðaleiðara og í sambandi við ringmerkingar hjá góðkendum ferðaleiðara.**

**ÁTAK: Skelti eigur at verða sett upp Suðuri í Dølum, sum kunnar um hetta serstaka økið, og um at ferðafólk ikki eiga at fara einsamøll víðari suður í Urðina. Ein kikari eigur at verða settur upp á hesum stað, so ferðafólk kunnu njóta útsýnið haðani.**

(3) MEIRA KUNNING FÆST Á US.FO



*"Nólsoyingar hvíla ótrúliga væl í sær sjálvum, og tað sæst aftur í mentanini her á oynni, sum er skapandi, spælandi og savnandi. Hon ger Nólsoynna serstaka og bygdasliga, men upp á tann kula mátan"*

*Anja Hartmann Wardum,*
*kunningarleiðari Visit Nólsoy*

# KUNNINGARSTOVAN, UNDIRSTØÐUKERVI OG HENTLEIKAR

## KUNNINGARSTOVAN/VISIT NÓLSOY – MENNING OG NÝHUGSAN

Síðani Kunningarstovan læt upp á sumri 2007, hevur hon verið ein natúrligur miðdepil fyri ferðavinnuna í Nólsoy. Tørvurin og endamálið við Kunningarstovuni hevur støðugt flutt seg saman við økta ferðafólkatalinum og fleirstreingjaða ferðamynstrinum seinastu árini. Í 2019 varð virksemið hjá Kunningarstovuni bjóðað út av nýggjum, og í apríl 2020 varð nýggjur kunningarleiðari settur, nýggj høli og harvið ein møguleiki til at endurskoða og nýhugsa leiklutin hjá Kunningarstovuni. Við øllum teimum broytingum og sveiggjum, sum kunnu vera í ferðavinnuni og streyminum av vitjandi, kann ein kunningarstova lætt gerast viðbrekin, um hon einans hvílir á herðunum á einum ábyrgdara. Ynskiligt hevði verið, at ein arbeiðsbólkur – ella netverksbólkur - við avvarðandi aktørum í ferðavinnuni í bygdini og Visit Tórshavn varð skipaður til tess at stuðla upp undir virksemi, visjón og menning av Kunningarstovuni og ferðavinnuni, soleiðis at kunningarleiðarin kundi fingið eitt regluligt og skipað undirlendi at sparra við í ymsum málum. Harvið fáa vinna og íbúgvar ognarskap í stovninum, sum kortini varðveitir ein óheftan leiklut og virkar fyri alla ferðavinnuna. Harumframt kann ein netverksbólkur undir Kunningarstovuni áhaldandi tryggja framhald av og vitan um ferðavinnuna í Nólsoy. Eisini kann eitt víðkað samstarv við Visit Tórshavn vera við til at styrkja Kunningarstovuna, eitt nú við serstøkum tiltøkum (Oyggjadagar, Mentanarnátt, Vetrarljós o.o.) og at menna tilboð og upplivingar m.a. til cruiseferðavinnuna, umframt vera við til at menna vinnuferðavinnuna og partvís taka sær av fyrisiting og lætta á øðrum økjum.

**ÁTAK: Endurskoða bygnaðin av Kunningarstovuni: Kunningarleiðarin tekur stig til ein netverks-/arbeiðsbólk, sum virkar sum sparringspartur, sjálvboðin hjálp, vitanardeiling og framtíðartrygging av stovninum.**

**ÁTAK: Samstarvið millum Visit Nólsoy og Visit Tórshavn eigur at styrkjast á fleiri økjum.**





> “Tá Ternan knappliga fer úr sigling í háárstíðini, er hetta at samanlíkna við koronasmittuvandan: Alt verður avlýst og niðurlagt, og ØLL ferðavinnan á oynni svíður!”
>
> *Terji Rasmussen, íbúgvi í Nólsoy*

# ATKOMA OG UNDIRSTØÐUKERVIÐ TIL OYNNA

Fyri eina oyggj sum Nólsoy er ferðasambandið til og frá oynni altavgerandi. Ikki einans fyri dagliga lívið og yrkið hjá íbúgvunum, men eitt regluligt, vælvirkandi og trygt ferðasamband er ein grundtreyt fyri, at ferðavinnan á oynni kann mennast. Flest ferðafólk koma um summarið, í háárstíðini, sum gongur frá 1. mai til 1. septembur. Árini undan, at Covid-19 farsóttin ávirkaði alt ferðamynstur, vóru sterkar ábendingar um, at longdin á háárstíðini støðugt tambaðist, bæði undan maimánaði og langt út á heystið. Avtalur millum veitarar á staðnum og ferðasmiðir/fyriskiparar uttaneftir verða mangan gjørdar upp til eitt ár frammanundan. Kapasitetsøkingin umborð á Ternuni frá 93 (uttan eykamann) og upp til 200 ferðandi (við eykamanni) er eygsýnliga stórur munur. Tá farleiðin av ymsum ávum brádliga ikki tekur hendan kapasitetin, so fella nógvar avtalur burt í ferðavinnuni og eru harvið mist inntøka. Fyri ferðalagið, sum skal vitja Nólsoy, merkir hetta, at tey í bráðskundi mugu umskipa drúgva fyrireiking. Langtíðaravleiðingar av hesum avlýsingum og óreglusemi á farleiðini kunnu verða, at ferðasmiðir og bólkar meta tað vera ov ótrygt at fyriskipa túrar út til oynna.

Hóast Strandfaraskip Landsins (SSL) ikki altíð eigur ábyrgdina av, at Ternan fer úr sigling, og harvið at órógv og óreglusemi kemur á farleiðina, so kann SSL hjálpa til við at gera kunningina um broytingar á farleiðini so góða og smidliga sum gjørligt, umframt at árlig eftirlit av ferjuni verða løgd í lágárstíðini. Eisini skal nevnast, at nógv ferðafólk koma við øðrum bátum á land um summarið. Eitt nú við Norðlýsinum, skjóttgangandi bátum og privatbátum.

**ÁTAK: SSL og Kunningarstovan samskifta neyvt um at fáa kunning um broytingar í ferðaætlanini út til ferðafólkini.**

**ÁTAK: (a) SSL eigur at hava fyrilit fyri samlaða tørvinum á ferðaflutninginum, harvið eisini fyri ferðavinnuni og (á) betra um kunningina viðvíkjandi broytingum í ferðaætlanini og (b) gera árligt eftirlit og ábøtur av ferjuni í lágárstíð.**

## HAGTØL 2009-2019 NÓLSOYARLEIÐIN, SSL

| Ár | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Ferdafólk | 65.806 | 62.839 | 71.501 | 91.790 | 73.150 | 73.905 | 87.597 | 94.175 | 101.097 | 96.435 | 100.873* |
| Øking | | -4,51% | 13,78% | 28,38% | -20,31% | 1,03% | 18,53% | 7,51% | 7,35% | -4,61% | 4,60% |
| Akfør | 74 | 1.128 | 4.951 | 3.602 | 4.012 | 3.581 | 3.521 | 3.869 | 5.447 | 4.721 | 5.303 |

## FERÐAFÓLK NÓLSOYARLEIÐIN, TRÝ TILVILDARLIGA VALD ÁR

| | 2014 | 2016 | 2019 |
|---|---|---|---|
| Januar | 4.406 | 5.824 | 6.473 |
| Februar | 4.400 | 5.823 | 5.910 |
| Mars | 5.366 | 6.955 | 7.121 |
| Apríl | 5.626 | 7.392 | 6.463 |
| Mai | 6.014 | 10.974 | 9.918 |
| Juni | 8.259 | 10.370 | 13.060 |
| Juli | 9.991 | 11.768 | 14.053 |
| August | 7.849 | 10.088 | 12.302 |
| September | 5.836 | 6.823 | 5.717 |
| Oktober | 6.240 | 5.485 | 6.630 |
| November | 4.956 | 5.288 | 6.297 |
| Desember | 7.013 | 6.444 | 5.819 |
| **Íalt** | **73.905** | **94.174** | **100.873** |

Havast skal í huga, at hetta er ikki tøl fyri ferðafólk einans, men eisini tey fastbúgvandi, sum pendla.

Vert er at nevna, at í juli 2019, tá økingin var 4,6% fyri alt árið, varð Ternan í juli tikin úr sigling í nakrar vikur samanlagt, og smærri bátar settir í staðin, sum einans tóku 50 ferðafólk (ongi akfør).

Kelda: ssl.fo

# HENTLEIKAR TIL FERÐAFÓLK

## HÚSVOGNAR

Eitt avmarkað pláss er á eiðinum fram við fótbóltsvøllinum til húsvognar. Pláss er fyri uml. 5-6 húsvognum. Ókeypis er at seta húsvognar har, men goldið verður fyri streym í Kunningarstovuni. Summarið 2020 verður økið víðkað til eisini at umfata fótbóltsvøllin, sum fórst av óveðri og brimi veturin 2019-20, soleiðis at munandi fleiri húsvognar kunnu standa á eiðinum í senn. Fyribils er hetta ein royndarætlan, til støða verður tikin um nakað varandi. Nú øking er í húsvognavitjandi í bygdini summarið 2020, kundi hetta verið eitt høvi at spurt, um hetta slagið av ferðavinnu er ynskiligt í Nólsoy?

**ÁTAK: Royndarætlanin við húsvognum fyri 2020 verður eftirmett. Síðani verður ein heildarætlan fyri húsvognaferðavinnuna fyriskipað.**

## TJALDING

Eitt jarðarstykki oman fyri Klivar er sett av til tjaldarar. Stykkið er stórt, so nógv tjøld rúmast har. Skelting manglar á staðnum, sum týðuliga vísir, hvar á leið tjøldini kunnu setast upp. Onkutíð hava tjaldarar sett síni tjøld alt ov ytst við eggina. Hetta er ikki bara ótrygt, men beinleiðis vandamikið, tí brimið hevur máað so mikið av undirlendinum, sum í støðum er poknut og kann rapa.

**ÁTAK: Við tjaldingarstaðið er bráðneyðugt, at skelti koma upp um trygdina**

## ALMENN VESI OG BRÚSUR

Tvey almenn vesi við hondvaski standa uttan fyri Avhaldshúsið, men eru tey í sera ringum standi og eiga at verða dagførd og nútíðargjørd. Vesi er eisini í bíðirúminum úti á Klivum. Hvørgi av hesum vesum eru atkomulig fyri koyristólar. Ongin almenn brúsa er til ferðafólkini, sum koma við húsvogni, tjaldi ella báti. Einans ferðafólk, sum leiga t.d. Royndarhúsið hava atgongd til eina brúsu. Almennar vaskimaskinur og turkiskáp eru ikki á oynni. Stórur tørvur á hesum er til ferðafólk, sum koma við húsvogni, tjaldi ella egnum báti. Eisini áttu fleiri ruskspannir at verið settar upp ymsa staðni í bygdini.

**ÁTAK: Ein ætlan fyri almennar hentleikar so sum brúsu, vesi, vask, rusk skal gerast.**

## ATKOMA TIL FÓLK VIÐ KOYRISTÓLI

Síðan Ternan kom í sigling á Nólsoyarleiðini í 2010, er munandi bati gjørdur til fólk í koyristóli. Lyfta er umborð til koyristólar og barnavognar. Tó er leiðin at koyra av Klivum og heim í bygdina long. Eiheldur er atkoma til koyristólabrúkarar til almennu vesini, sum eru.

**ÁTAK: Heildarætlan fyri koyristólabrúkarar eigur at verða gjørd.**

## SAMANUM

kann sigast, at verða hentleikar hjá eitt nú Royndarhúsinum og Avhaldshúsinum dagførdir við teimum byggiætlanum, sum fyriliggja, kann Nólsoyggin gerast partur av vinnuferðavinnuni, við at fundir, skeið, ráðstevnur heilt ella partvíst kunnu leggjast í Nólsoy. Vinnuferðavinnan (MICE = Meetings Incentives Conference Exhibitions) er í støðugari menning, og við teimum útbyggingum við gisting og matveitarum í høvuðsstaðnum er væntandi, at alsamt fleiri venda eyguni móti Føroyum fyri at skipa fyri altjóða ráðstevnum, skeiðum og øðrum – og kundi Nólsoy verið ein spennandi og forkunnugur viðleikari á hesi greinini í ferðavinnuni.

# SØVN, FORNMINNI OG MENTANARARVUR

Fleiri vitjanarverd søvn og fornminni eru í Nólsoy, sum lýsa hugtakandi søgu og mentanararv úr fortíðini. Hóast øll ikki verða nevnd her, er felags fyri tey, at kunningin og miðlingin um hesi støð, lutir og bygningar áttu at verið mentar. Hóast tann livandi ferðaleiðarafrásøgnin kanska er tann mest hugtakandi og nærverandi, so er ikki altíð, at møguleiki eru fyri tí tænastuni. Eiheldur er atgongd møgulig alla tíðina til øll støð, men eru hesi opin eftir avtalu. Kunningarskelti og talgildar loysnir kundu verið góð ískoyti til miðlingina, soleiðis at tað ikki einans er talan um fólk og lutir úr fornari tíð, men at fortíðin verður miðlað ígjøgnum livandi nútíðarbrillur. Eitt nú við at menna kunningarsíður, sum liggja á heimasíðum, sum eru knýttar at skeltinum á staðnum við QR-kodum, m.a. á heimasíðuni hjá Tjóðsavni Føroya og Visit Nólsoy.

## BYGDARSAVNIÐ HÚSINI VIÐ BRUNN

er ogn hjá Nólsoyar Fornminnisfelag og er opið um summarið eftir avtalu. Húsið hevur ríka søgu og hevur alskyns fornlutir og er rikið av ídnum sjálvbodnum persónum. Húsið fær kunningarskelti í næstum, og skal framhaldandi samstarv vera við Kunningarstovuna um túrar við ferðaleiðara og møguleika at hava opið eftir tilkalli.

## OVASAVNIÐ

har báturin hjá Ova Joensen, Diana Victoria, verður sýndur fram eftir avtalu. Hetta savn við hesi serstøku søgu hevur stóran áhuga millum føroyingar og ferðafólk annars. Nógv tilfar er um persónin Ova Joensen, sála, og lív hansara sum sjómaður úti í verð og um túrin, sum Ove róði einsamallur við Dianu Victoriu til Danmarkar í 1986. Savnið átti at verið dagført, soleiðis at báturin og søgan um Ova Joensen fingu størri pláss, og at fleiri ferðafólk fingu møguleikan at síggja og hoyra um hetta serliga bragd og um úrmælingin Ove Joensen.

## TOFTIRNAR Í KORNDALI (PRINSESSUTOFTIRNAR)

Stutt sunnan fyri bygdina innan fyri bøgarðarnar liggja toftirnar av býlinginum í Korndali, har fólk búðu frá um 1300 til mitt í 1700. Søgnin sigur, at skotsk kongadóttir búsettist í Korndali. Prinsessutoftirnar er eitt av vitjanarverdu støðunum í Nólsoy, sum liggur einans stuttan spákitúr úr bygdini, og verður hesin túrur ofta knýttur upp í ferðaleiðaratúrarnar runt í bygdini. Hesar fornleivdir eru friðaðar, og varðir Tjóðsavnið av teimum.

**ÁTAK: Skelti um prinsessutoftirnar í samstarvi við Tjóðsavnið. Viðlíkahald, røkt.**

Ein talgild uppliving, sum longu er tøk í Nólsoy, er ein audio walk um Prinsessuna í Korndali, sum ein avlesur við QR-kodu á keiðkinum og fær inn á fartelefonina. Ein túrur á um leið 45 minuttir, sum byrjar á keiini og leiðir lurtaran gjøgnum bygdina út til prinsessutoftirnar, ímeðan ljóðmyndin verður fortald á telefonini. Áhugavert hevði verið at ment fleiri slíkar ljóðmyndir, sum við orðum, ljóðum, sangi og spæli siga frá serstøkum søgum og hendingum úr fortíðini.

## VITIN OG HÚSINI Á BORÐUNI

Sum er, eru vitar og tilhoyrandi bygningar í Føroyum danskt málsøki og verða umsitin av Søfartsstyrelsen. Rík søga knýtir seg til vitan á Borðuni, sum sigst hava størstu linsu av slíkum slag í Evropa. Vitin og vitapassarahúsini eru stongd fyri almenninginum. Eftirlitsfólk undir Søfartsstyrelsen ganga vakt har úti og gista, men títt og ofta er ongin har, og allar dyr eru læstar. Nógv ferðafólk ganga túrin út á Borðuna og aftur. Ongin miðling er (uttan tá ferðaleiðarar eru við) um søguna á Borðuni. Nógv ferðafólk spyrja eftir kunning. Skelti átti at verið sett upp í samráð við Søfartsstyrelsen, sum kunnaði um vitan og søguna við vitanum, - um lívið á Borðuni, tá fólk búðu har fast. Eisini eru krígsminni á Borðuni, sum somuleiðis áttu at verið miðlað betur, eitt nú við einum lítlum kunningarskelti.

**ÁTAK: Á heimasíðuni hjá visitnolsoy.fo og tjodsavnid.fo verður í teksti, myndum og tekningum sagt um søguna um fornminnini og søvn í Nólsoy. Møguliga skulu QR-kodur á skeltum verið knýttar at heimasíðunum.**

## AÐRAR ÆTLANIR

Einstaklingar í bygdini hava saman við kommununi ætlanir um at byggja nýtt Ovasavn, sum eisini kann rúma Kunningarstovuni. Hetta skal vera gjørt innan 1-2 ár.

## LANGTÍÐARÆTLAN

Einstaklingar í bygdini hava ætlanir um at byggja ein ferðavinnudepil á keiøkinum aftan fyri gamla molan (tangan). Ein depil, har ferðavinnan kann savnast og savna fleiri súlur á einum og sama stað: Fundarhøli, fyrilestrarhøli, framsýningarhøli til list hjá eitt nú Steffan Danielsen og aðra list. Neyst og framsýning til Dianu Victoriu. Heimavirkið hevur sølubúð. Kafé. Dráttur út á sjógv, har ymiskt sjóvirksemi/vatnsportur kann fara fram so sum kajak, kaving, snorkling, standa á seiðabergi, møguleiki at fiska við báti og annað.



TÓRSHAVNAR KOMMUNA
OG VISIT TÓRSHAVN
DESEMBER 2020